

# Føroyar mítt land

Innihaldið í sendirøðini "Føroyar mítt land" í vikuni var sera fjølbroytt. Vikan byrjaði við, at vit hoyrdu um ta fyrstu, føroysku myndabókina fyri børn, ið nevnist »Í skýmingini«, og sum kom út í 1948. Síðani var ein sending um tað løgna fyribrigdi livurhøgg; nú Ólavsøkan nærkast hoyrdu vit brot úr søguni um, tá núverandi løgtingshús varð bygt fyri stívliga hálvannað hundrað árum síðani; vit fóru hundrað ár longur aftur í tíðina, har trivið varð í søguna um ein ungan søldfirðing, sum giftist til Hoyvíkar, har tvey staðarnøvn minna um hann; og vikan endaði við nøkrum hugleiðingum um Ólavsøkuna í gomlu Havnini. Tey, sum løgdu sendingarnar til rættis hesa vikuna, vóru: Turið Sigurðardóttir, Janus Mohr, Anja Andreasen, Maria Jacobsen og Eirikur Lindenskov.

Rás2, sunnudagin klokkan 13.

Føroyar mítt land í næstu viku:
21/7 Janus Mohr
22/7 Ólavur Hátún
23/7 Ólavur Hátún
24/7 Janus Mohr

Hvønn gerandisdag kl.8, kl.9, kl.22 og kl.23, (týsdag tó 2230). Vegna Ólavsøkuna verður Føroyar Mítt land eftir nevndu sendingar ikki aftur at hoyra fyrr enn hósdagin 31. juli.

Sosialurin